
Polar Empress er eitt av skipunum sum Dolphin brúkar til kanningar. Mynd: Jan Muller/oljan.fo

# Dolphin: Skuldin munandi hægri enn ognirnar

**Jógvan Hugo Gardar**

27.12.2015 - 08:39

Oljan.fo

Húsagangurin hjá norska felagnum Dolphin Group vísir at skuldin er hægri enn virðini í felagnum.

Fyribils vísa tølini, sum eru komin fram í býrættinum í Oslo, at skuldin í felagnum er minst fimm milliardir danskar krónur (6,43 milliardir norslar krónur).

LES EISINI: Seismikkfelagið Dolphin er sent í skiftirættin

Maritime skrivar at bara í dótturfelagnum Dolphin Geophysical er skuldin 4,7 milliardir norskar krónur.

Dolphin eigur einki av teimum sjey skipunum sum arbeiða fyri fyritøkuna, og tí liggja virðini fyrst og fremst í seismikkútgerð og savninum yvir seismiskum kanningum.

Greinarar sum Maritime hevur tosa við meta at útgerðin hevur eitt virði uppá millum 850 milliónir norskar krónur og í mesta lagið 1,7 milliardir norskar krónur.

Tað sama er galdandi fyri savnið av dátum, sum hevur eitt virði uppá umleið 1,4 milliardir norskar krónur.

Dolphin Group er fyrsta norska frálandsfelag sum er farið á heysin aftaná at oljukreppan byrjaði summarið 2014.